# Ungdómurin og loysingin

## Føroyski ungdómurin er so mikið at sær komin, at hann ásannar, at loysingartosið er barnalótir

Aftur til hetta val eru okkara sokallaðu »loysingarflokkur so smátt byrjaðir at hvessa oddin til tjóðskaparstríði, hóast teir ikki enn og kanska heldur ikki fara at vrea so mannsterkir sum áður, tí fjøldin hevur umsíður fingið eyguni upp fyri hesum ørvitistosi, tá teir ikki meina eitt einasta orð við tað. Møguleikarnir hava teir havt; men longur at halda tjóðina fyri gjøldur, gongur aldeilis ikki, tí hon er ikki tann drumbur, tit halda hon er og vilja gera hana til.

Tað skerst ikki burtur, at drepandi fyri allan føroyskan politikk upp ígjøgnum árini, er barnatalan um loysing og ikki loysing. Aðaltráðurin í føroyskum politikki, har spjaðing, forbannilsir, arbeiðsloysi, vána politisk fyriskipan og annað hevur staðist av, botnar í tjóðskaparpolitikkinum.

### Til gjøldurs

Hesin politikkur, sum bert hev ur verið nýttur til atkvøðutroling, hevur orsakað óbótaligan skaða fyri føroysku tjóðina. Ístaðin fyri at tosa um skilaligan politikk, eina miðvísa ætlan við samfelagnum og á besta hátt útbyggja samfelagið, hava hesir loysingarromantikkar droymt dáradreymar, har hvørki høvd ella hali hevur verið í; men harafturímóti samfelagslig drepan. Ein drepan, sum tjóðin í dag og mong ár framyvir kemur at liða undir.

At alt slítingartos hevur verið út í æsir fjakamannatos, er einum og hvørjum rætthugsandi føroyingi givið. At trína fram á ein røðarapall í føroyskum klæðum við einum ella øðrum loysingatosi og so tríva til endans í eina yrking, sjálvandi rótføroyska, av einum ella øðrum góðum føroyingi, er fult út at gera grin við okkara dýrabara skaldskap og teimum veldugu kenslum, ið tað tjóðskaparliga orsakar í hvørjum mannabarmi.

### Danir gjalda

Einasta bragd, hesir sokallaðu »loysingarflokkar« framdu á loysingarøkinum, var at flyta jólaheilsurnar frá føroyingum á flatlondum til útvarpið. — Ikki eiti á loysingarroysni. Harafturímóti vóru teir mentir at hækka útreiðslurnar hjá dønum í Føroyum við heilum 100 pst., tey fýra árini teir sótu við róðri.

Enn í dag tora hesir somu flokkar, hóast tað ikki er so ógvusligt sum fyrr, at billa Føroya fólki inn, at grundin til allan ótrivna her í Føroyum er samhaldið við Danmark. Nei, tit hugsandi veljarar, hetta loysingartos hevur orsakað so stóran skaða, sum fáur man vera greiður yvir.

Hvat líkist tað, at vit í dag skulu nýta 14 milliónir at gera okkum vegir, sum áttu og skuldu staði lidnir fyri mongum árum síðan. Hvat líkist tað somuleiðis, at vit í dag skulu spýta aðrar milliónir til havnabygging, lendingar, fjallasmogur, brýr og mangt annað, tá vit sambært fyrrverandi stýrisskipan høvdu rætt at fingið hesi mál avgreidd tá, líka so væl sum einhvør onnur donsk amt. — Men okkara politikkarar vildu heldur tosa um loysing og samband, enn at føra veruligan politikk. Tí var tað harðliga fyri neyðini, at Javnaðarflokkurin trein fram í 1928 og fekk kovt nakað av loysingartosinum, so menn í staðin kundu tosa um veruligan politikk og fremja tær ábøtur her á landi, ið harðliga vóru fyri neyðini.

### Einasta leið

Støða Javnaðarfloksins hevur altíð verið og er, at vit skulu yvirtaka, tá hetta er til egið gagn, og miðar hetta heilt ímóti loysingini. Men vit rópa ikki dag og dagliga um tjóðskaparpolitikkin; men fremja harafturímóti gerðir. Javnaðarflokkurin kravdi, at føroyskt skuldi vera kenslumálið í skúlanum, at eingin lærari bleiv fastanasettur uttan prógv í føroyskum, at flaggið skuldi fáa viðurkenning. Hevur verið við til at framt tey yvirtøkumál, ið framd eru síðan heimastýrislógina, og hetta valskeið hava vit fingið umboð í Norðurlanda Ráðnum, mann settan í Rom, mann settan í uttanríkisráðið, FM støðirnar yvirtiknar og soleiðis kundi verið hildið fram at víst á mál, ið flokkurin hevur verið við til at framt, tá hetta hevur tænt tjóðini best.

Tjóðskaparspurningurin er dýrabærari enn so, at man bert uttan viðari kann tveita runt um seg við høgum lyftum og royna at fáa hendur á teimum sálum, har spurningurin er týðandi. Vit mugu virða okkara tjóðarmentan, so hetta ikki gerst til ein politiskan kastibólt.

Støða javnaðarfloksins er greið. Gerðirnar prógva. Tí er at venda burtur frá hesum ordloysingum og fylkjast um flokkin, har orð gerast veruleiki.

*Villi Hansen.*

# Islev skoles pigekor

Í hesum døgum eru nakrar og fjøruti gentur í 12-19 ára aldri á sangferð í Føroyum. Synd er at siga, at tær hava verið hepnar, hvat veðrinum viðvíkur. Tí verri veður enn hesar seinastu dagarnar, kunnu tær neyvan fáa.

Leygarmorgunin tíðliga skuldi ferðin verið byrjað úr København, men veðurgudarnir vóru ikki til vildar. — Ikki fyrr enn kl. 16 sunnudagin komu summar av teimum til Havnar. Longu kl. 17 høvdu tær fyrstu knsertina í høllini á Føroya læraraskúla.

Ógviliga fittar og smílandi løgdu tær fyri við at syngja eyðkennislagið, skúlin hevur valt sær.

Skráin var fjølbroytt. Tær sungu m. a.:

Berlinerluft — Poul Lincke
Vi fløjter og tar fat:
F. Churchill
Med et smil og en sang:
F. Churchill
I feel pretty:
Leonard Bernstein
I østen stiger solen op:
N. W. Gade
Elverhøjsange:
Fr. Kuhlan
Liebesmädchen:
Joseph Haydn
Jeg gik mig ud:
Folkemelodi
Die gefangene:
A. Dvorak
Die wilde Rose
A. Dvorak
o. a.

*Dirigentur:* Kai Holsko.

*Pianist:* Solveig Pedersen

*Solistar:* Hanne Hansen
Pia Knudsen
Gitte Hansen

*Duet:* Birthe Laur Jensen
Anne Christensen
Jonna Glisberg
Jeanette Henvard

*Guitarist:* Søren Hansen
Gitte Hansen

Bert spell, at tað ikki vóru fleiri fólk; men við tað, at konsertin var útsett fleiri ferðir, so var tað ikki lætt at fáa høllina fulla, tí tað má hon vera, um vit kunnu fáa nóg góðan klang.

Burtursæð frá, at tað ikki vóru so nógvir áhoyrarar, so var hetta ein góð konsert, sum vit takka teimum fyri.

Tá ein lítil steðgur var sungu og spældu tey bæði systkini Gitte og Søren.

Síðani bar sangstjórin eina heilsu til landsstýrismannin Jákup Lindenskov frá borgarstjóranum í Rødovre. Samstundis handaði hann landsstýrismanninum eina bók: Rødovre kommune. Ríkisumboðsmaðurin fekk eisini eina tílíka bók.

Jákup Lindenskov beyð gent unum at vera vælkomnan og vónaði, at tær fingu eina góða ferð, hóast hetta hetta ringa veðrið.

*Hanna.*

# Har tað privata ...

*(Framhald frá 2. síðu)*

da, at bara pengar eru í landskassanum, ja so stendur væl til, tað kann vera líka mótsett.

Men rætt skal vera rætt, vit vóru í penganeyð. Men vit góvu ikki upp av teirri orsøk, tvørturímóti. Tá allarringast stóð til peningaliga, løgdu vit figgjarliga støði undir tað vinnulivsuppbygging, sum í dag fyri ein stóran part er orsøkin til, at útflutningur okkara er so nógv vaksin, sum hann er tað seinri tíðina, og ongantíð hevur slíkur framtakshugur verið millum føroyingar, sum hann er tað í dag, nú vit fara til val.

Men hetta er bert á tí vinnuliga økinum, og her eru møguleikarnir bert partvís útnyttaðir. Men nú eru við politiskum avgerðum — og hetta eigur at undirstrikast her, at tað er vegna politiskar avgerðir undir núverandi samgongu, hetta eiga øll at vita, fyri at kunna meta rætt og taka avgerð hareftir nú farið verður á val.

Vit kunnu nú lána bíligan pening til skipabygging, og vit kunnu nú lána bíligan pening til ídnaðarútbygging. Tað vil siga, at vinnan bæði á sjógv og á landi, nú kann arbeiða undir munandi betri korum enn nakrantíð áður.

— *Og hvat kemur so hetta at týða fyri tann einstaka, fyri arbeiðarin og fiskimannin?*


— Jú tað má koma at týða tað, at bæði arbeiðaranum á landi og fiskimanninum umborð verða ikki einans tryggjaði regluligt arbeiði; men so nógv betri løna arbeiði, tí vinnan kemur nú at arbeiða undir so nógv betri korum, kann moderniserast og rationaliserast, so nógv færri fólk nýtast til sama arbeiði, og harvið størri úrtøka, tí sama penganøgd verður býtt í so nógv færri partar.

Og so tað almenna. Vit verða ikki noyddir til at ganga so nær í skattum og avgiftum, sum vit hava verið noyddir til, tað samfelagið alt vinnur so nógv meiri av tí at vit framleiða meira. Eisini hava vit fyri tað almenna fingið nógv betri skipan, við tað at tann sokallaði 60 milliónagrunnur, nú verður tvífaldaður, og at hesin grunnur eisini lænir til nógv bíligari rentu, enn vanlig marknðarrenta er.










**FAKFELAGSSPURNINGAR TIL ÓLA JACOBSEN, GØTU**

Tygum hava ofta sera skilagóðar greinir í bløðunum um viðurskiftini í Føroya fiskimannafelag, ikki minst hava tygum fílst á hvussu skrivarastarvið í Føroya fiskimannafelag hevur verið (van)røkt!

Men hvat halda tygum um tað, at formaður Fiskimannafelagsins harra Erlendur Patursson saman við Reiðarafelagnum og finansmonnum stillar seg solidariskan *mótvegis* einum uppskoti, sum verður sett fram til stóran bata fyri fiskimenn?? Uppskot Atla Dams á løgtingi.

Er tað acceptabult, at ein fakfelagsformaður arbeiðir saman við arbeiðsgevarum móti fiskimonnum? So vítt mær kunnugt, er Erlendur fyrsti fakfelagsformaður í verðini, sum hevur verið at sæð í slíkum selskapi!

Er formaður okkara í ørviti ella var tað bara tí, at javnaðarmaðurin Atli setti fram uppskotið, at hann valdi at vera ímóti.

Tá ið eg eri farin at spyrja tygum, hvat tygum halda um ein slíkan formann, so er tað m. a. av tí, at eg havi lisið ein stubba, tygum høvdu í 14. september, um tað skoðsmál hesin sami fakfelagsformaður hevði um arbeiðsmenn, fiskimenn o. a.

Eg loyvi mær at taka uppaftur ta grein, sum stóð í 14. September.

*Forvitin felagslimur.*

Hendan greinin stóð í 14. September 23.5. 1970:

ODDAGREININ

Hýsið mær hesum reglum.

Leiðarin í 14. September seinasta leygardag gevur sanniliga hvørjum sítt. Nú er tað so, at tá ein lesur henda leiðaran er eingin ivi um, hvør ið skrivað hevur. Og tí er tað sera áhugavert at síggja tað skoðsmál, sum fiskimenn, arbeiðsmenn og aðrir lønarstættir fáa. Orðini eru eitt sindur innballað, men eingin ivi er um meiningina, tá greinskrivarin sigur um hesar stættir:

1. Teir eru undirbrotligir.
2. Teir eru lættkeyptir.
3. Teir lata seg ugga og fáa sálarfrið, bert teir fáa innantómar tátur stungnar í munnin.
4. Hetta munnu hesir stættir fara at hava í huga, tá píparn innan leingi fær eitt annaað ljóð og roynt verður á allan hátt at tekkjast hesum stættum í orðum.

*Óli Jacobsen.*

*P. S.* Rætt var, sum Óli spáddi. Nú er Erlendur fullur av øllum søtum orðum og lyftum til hesar, sum hann gav áðurnevnda skoðsmál. Vit eru helst fleiri, sum hugsa sum Óli í hesum spurningi.